# Tvey brak í oddinum

**H71-StÍF og VÍF-Kyndil eru á skránni hetta vikuskiftið. Tveir dystir, sum antin kunnu skilja oddin frá hinum - ella blása oddastríðið víðopið aftur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Stóri spurningurin hjá H71 kann væl vera, hvørt spælararnir duga at venja seg við tilveruna sum oddalið*

Vinna H71 og VÍF sínar dystir, so hava liðini fýra stig niður til næsta kappingarneytarnar. Og soleiðis kunnu tey standa í eini framúr støðu í endaspurtinum. Hinvegin er eisini hugsandi, at bæði útiliðini strúka avstað við stigunum. Og so er alt púrasta opið aftur. Fýra lið við eins nógvum stigum, ljóðar nærum sum óhugnaligur spenningur.

### Uttan Svein

Hjá StÍF er talan tó um tunga fráveru, nú Sveinur Justinussen ikki er partur av liðnum. Sveinur fekk eitt – kanska bíligt – reytt kort móti Kyndli mikukvøldið, og tí er hann leikbannaður til sera týdningarmikla dystin leygardagin.

Hoyvíkingar kunnu hinvegin gleðast um, at teir eru fullmannaðir. Og tað verður ivaleyst eisini neyðugt, nú trýstið av álvara er farið at merkjast hjá teimum. Kanska er tað júst í hesum, at størsta forðingin hjá liðnum er. Siðvenjan talar ikki fyri, at teir skulu gera seg galdandi heilt fram til finaludystirnar, og størsta avbjóðingin í so máta er at fáa spælararnar at venja seg við tankan. Ein tanki, sum var nær við at forkoma teimum sigurin móti KÍF seinast.

### Sperdir Kyndils-menn

Í Vestmanna er einki at ivast í, at talan verður um satt brak. Kyndil vísti nakað av stórspælinum, tá teir í 50 minuttir vundu burtur úr StÍF mikukvøldið. At tað so kortini kiksaði við finaluplássinum í steypakappingini man uttan iva hava sært spælararnar illa. Og so er spurningurin, hvørt reaktiónin upp á vónbrotið verður at geva skarvin yvir, ella at satsa alt upp á FM-stríðið.

VÍF er kanska ikki heilt so kroyst. Teir hava longu vunnið seg fram í steypafinaluna, og í landskappingini er talan ikki um vanlukku, um talan ikki verður um sigur. Tað kann tí hugsast, at hetta gevur teimum neyðuga sálarfriðin til at fara til dystin sunnudagin uttan somikið av nervum, at hetta fer at bila í spælinum.

Seinasti dysturin verður í Hovyíkarhøllini sunnudagin, tá KÍF og Neistin takast. Fyri spenningin í kappingini hevur úrslitið sum so ongan týdning. Men bæði liðini hava upplivað stórar batar í spælinum seinastu tíðina. Og tí vilja tey uttan iva royna at byggja víðari upp á góðu gongdina.

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

**FM-bólkurin**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 3 | 2 - 0 - 1 | 77 | 61 | 16 | 4 |
| 2 Stjørnan | 3 | 2 - 0 - 1 | 78 | 66 | 12 | 4 |
| 3 VB | 3 | 2 - 0 - 1 | 65 | 75 | -10 | 4 |
| 4 Kyndil | 3 | 0 - 0 - 3 | 55 | 73 | -18 | 0 |

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

**Niðari bólkurin**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StíF | 3 | 3 - 0 - 0 | 76 | 57 | 19 | 6 |
| 2 Søljan | 3 | 2 - 0 - 1 | 61 | 60 | 1 | 4 |
| 3 VÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 65 | 72 | -7 | 2 |
| 4 Tjaldur | 3 | 0 - 0 - 3 | 62 | 75 | -13 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 H71 | 3 | 2 - 0 - 1 | 354 | 298 | 56 | 12 |
| 2 VÍF | 3 | 3 - 0 - 0 | 357 | 342 | 15 | 12 |
| 3 Kyndil | 3 | 1 - 0 - 2 | 342 | 308 | 34 | 10 |
| 4 StÍF | 3 | 2 - 0 - 1 | 325 | 323 | 2 | 10 |
| 5 KÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 318 | 354 | -36 | 4 |
| 6 Neistin | 3 | 0 - 0 - 3 | 340 | 411 | -71 | 1 |

**Flogbóltsstøður**
**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 13 | 13 - 0 | 39 | 12 | 27 | 16 |
| 2 SÍ | 13 | 8 - 5 | 29 | 24 | 5 | 9 |
| 3 ÍF | 12 | 6 - 6 | 26 | 23 | 3 | 6 |
| 4 TB | 13 | 6 - 7 | 25 | 22 | 3 | 8 |
| 5 Mjølnir | 12 | 3 - 9 | 15 | 30 | -15 | 4 |
| 6 KÍF | 13 | 2 - 11 | 12 | 35 | -23 | 3 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 9 | 8 - 1 | 25 | 10 | 15 | 9 |
| 2 SÍ | 8 | 6 - 2 | 21 | 10 | 11 | 6 |
| 3 Mjølnir | 8 | 4 - 4 | 17 | 13 | 4 | 4 |
| 4 ÍF | 9 | 3 - 6 | 14 | 20 | -6 | 3 |
| 5 Nøvan | 8 | 0 - 8 | 0 | 24 | -24 | 0 |

KÍF-SÍ 3-1 (26-24, 25-23, 19-25, 25-22):

## SÍ snávaði

Kvinnurnar hjá SÍ mistu sera týðandi fet í heiðursmerkjastríðnum, tá tær mikukvøldið vitjaðu hjá KÍF.

KÍF hevur alt árið verið í botninum á talvuni, meðan SÍ hinvegin hevur amast móti toppinum, og tí átti talan á pappírinum at verið um lættan dyst hjá gestunum.

Men tað skuldi gerast alt annað enn lætt. KÍF hevði nevnliga ongan hug at geva seg, og tá tær fingu møguleikan, tóku tær av. Tey bæði fyrstu settini vórðu vunnin tepurt, og tó at SÍ royndi at svara aftur, so eydnaðist hetta bara hálvgum. Vertirnir tóku nevnliga eisini fjórða settið, og soleiðis skaptu tær aftur spenning í botnstríðið, har Mjølnir annars tóktust mest sum leysar.

**-mørk**

## Silvurdystur í Trongisvági

Tað líkist einum stríðið um silvurplássið, tá TB leygardagin tekur ímóti ÍF í meistaradeildini hjá kvinnum. Bæði liðini hava seinastu vikurnar strítt seg upp móti SÍ, og spurningurin er nú, hvør teirra skal fáa kanska avgerandi fyrimunin í hesum stríðnum. Samstundis er talan um eitt slag av generalprøva til steypafinaluna millum júst hesi bæði liðini.

Samstundis skal SÍ í Klaksvík prógva, at úrslitið mikukvøldið bara var ein kiksari. Í øllum førum hava tær illa ráð at kiksa enn einaferð, nú tær aðru ferð upp í slag skulu royna seg á útivølli móti einum av botnliðunum.

Hjá monnunum verður talan bara um tann eina dystin. Hesin verður í Klaksvík, har SÍ kemur á vitjan. Talan er somuleiðis her um ein dyst, sum kann fáa sera stóran týdning fyri stríðið um silvurmerkini. Og kanska enntá fyri gullstríðið eisini. Í øllum førum má taparin av dystinum roknast sum liðugur partur í tí stríðnum.

**-mørk**

## Stjørnan skal staðfesta finaluna

Hondbóltslandskappingin heldur frí á kvinnusíðuni hetta vikuskiftið, men ein dystur verður tó kortini. Í steypakappingini fara Stjørnan og VB nevnliga at avgreiða sína seinnu hálvfinalu leygardagin.

Hóast liðini hava spælt fleiri spennandi dystir í ár, so tykist talan tó mest ájøvn einum avgreiðsluspurningini hjá Stjørnuni hesaferð. Fyrra dystin í Vági vunnu klaksvíkarkvinnurnar nevnliga trygt 25-18, og tað er helst meira, enn VB ger sær nakrar vónir um at vinna í Klaksvík.

**-mørk**

**Dystaryvirlit**

**Hondbóltur - Atlantic Airways-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 28.01 | 16.00 | H71-StÍF | Jørn & Gert |
| 29.01 | 16.00 | KÍF-Neistin | Rúni & Ragnar |
| 29.01 | 16.00 | VÍF-Kyndil | Karstin & Kristjan |

**CocaCola-kappingin, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 29.01 | 15.00 | Stjørnan-VB | Kári & Dánjal |

**Flogbóltur - Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 28.01 | 14.00 | Mjølnir-SÍ | Dráttur |
| 28.01 | 15.00 | TB-ÍF | KÍF |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 28.01 | 16.00 | Mjølnir-SÍ | ÍF |